Olaf Olsen:

# Góðar royndir av íslendingum



*Olaf Olsen*

ÍSLAND
*Óli Jacobsen*
*oli@sosialurin.fo*

Tann fyrsti sum legði fyri á ráðstevnuni var Olaf Olsen, sum greiddi frá sínum royndum av íslendingum og um møguleikarnar hjá føroyingum í Íslandi.

Hansara fyrstu royndir stavaðu frá tí, tá hann sum ungur maður, sum aðrir føroyskir fiskimenn í 50-unum, fór til Íslands at sigla við trolarunum. Her var hann við árini 1955-57. Við hesum trolarum var manningin umleið helvt um helvt føroyingar og íslendingar. Olaf tekur til, at íslendingar vóru góðir at vera saman við. Samstarvið var gott umborð, og hann minnist ongan tvídrátt av týdningi. Ein av hansara íslendsku skipsfeløgum var Oskar Vigfusson, sum seinni gjørdist formaður í Sjómannasamband Íslands, og sum varð ein rættiligur føroyavinur. Olaf ber eisini honum alt gott. Olaf kom eisini tá at læra íslendskt, og hevur hetta havt týdning fyri hansara seinni samskifti við Ísland.

Hetta samskifti tók seg uppaftir, tá hann í 1970-unum var við til at stovna trolvirkið Vónina, og tá kom hann at hava samskfti við trolverkstaðið Hampiðjan. Hann gjørdist serligur vinur við stjóran Magnus Gustafsson, sum í dag er íslendskur aðalkonsul í New York, hóast teir í veruleikanum eisini vóru kappingarneytar.

Á Vónavirkinum høvdu teir eisini íslendingar. Olaf nevnir serliga ein íslendskan arbeiðsformann. Hann var ein tann raskasti maður, hann hevur kent. Ikki bert var hann raskur sjálvur, men hann dugdi eins væl at fáa onnur at arbeiða.

Í politikki kom Olaf eisini at hava nógv samband við íslendskar starvsfelagar, ikki minst tá hann var landsstýrismaður fleiri skifti. Íslendsku politikkarnir høvdu somu eginleikar, sum eisini í dag er eyðkenni fyri íslendingar. Teir smæddu seg ikki burtur, og teir góvu heldur einki frá sær við góðum. Men samskiftið var kortini sera gevandi.

### Stór vælvild

Stórt sæð kann sigast um samskiftið millum londini, at føroyingar kenna seg sum lítlibeiggin í samband við Ísland. Teir føla seg eisini sum stóribeiggin í mun til okkum.

Men sum tað er komið fram fyrr, so er vælvildin mótvegis føroyingum í Íslandi uttan mark. Hetta merkist ikki minst við gestablídnunum, sum ikki stendur aftan fyri tí føroyska.

Hetta er eisini eitt úrslit av tí sera breiða samstarvinum, sum leingi hevur verið millum londini bæði á mongum økjum. Umframt tað vinnuliga hevur verið nógv samstarv á mentunarøkinum.

Olaf vísti eisini til tað samstarv, sum hevur verið millum brøðrasamkomurnar í báðum londunum um legurnar við Ástjørn á Akureyri. Her vóru legur har dreingir vóru stóran part av summarinum. Jógvan Purkhús, sum hevur verið nógv við í hesum virksemi, greiddi frá, at fleiri av teimum "stóru" monnunum í Íslandi vóru á hesum legum sum smádreingir. Ein av hesum er forstjórin í skipafelagnum Samskip.

Samskiftið millum londini hevur seinastu tíðina verið merkt av, at íslendingar hava keypt ein stóran part av okkara vinnulívi, men lítið hevur verið hin vegin.

Men kortini er tað ikki minni enn einki. Fyri kortum keypti júst Vónin ein part av partapeninginum í Hampiðjan, sum er fyritøkan, Vónin hevur samstarvað við øll árini.

Tikið saman um metti Olaf, at møguleikarnir fyri samvinnu millum Ísland og Føroyum eru góðir, og tað skuldi ligið væl fyri við at menna hetta samstarv.

---

Halldór Pálsson:

# Góðar royndir av føroyingum

**Halldór Pállson er ein íslendskur forrætningsmaður, sum hevur havt nógv samband við Føroyar, og sum er væl førur fyri at meta um føroyingar**

ÍSLAND
*Óli Jacobsen*
*oli@sosialurin.fo*

Hann var upprunaliga telefonteknari og arbeiddi fyri íslendska telefonverkið á Akureyri.

Men so fór hann at gerast sølumaður, m. a. av bókum. Fyri einum 25 árum síðani fekk hann hug til at fara til Føroya at selja bøkur, men varð ávaraður um at hann lættliga kundi fara í bolt og jarn, so hann sló av. Hesin ótti var helst nakað ógrundaður, tí við neyðugum loyvum skuldi ikki verið nakar trupulleiki.

Seinni aftur fór hann at selja tryggingar, og tað lá væl fyri hjá honum. Hann gjørdist toppseljari og forvann nógvar pengar.

Tá flutti hann við familjuni til Suðurafrika í trý ár, og her var hann lutvíst á bíbliuskúla og lutvíst fekst hann við fastognarsølu.

Halldór flutti aftur til Íslands, og nú fór hann aftur at selja bøkur, og hesa ferð var tað ein serlig bók um Norðanlond.

Hana fór hann eisini til Føroyar at selja, og hann var væl móttikin. Hann sigur, at Føroyar líkast nógv Ísland uttan fyri Reykjavík. Her kunnu fólk taka eina skjóta støðu uttan ov mikið av dikkedar. Í t. d. Svøríki hinvegin skal eitthvørt, um tað bert er fyri fáar túsind krónur leggjast fyri nevndir á hægsta stigi, og hetta ger avgerðargongdina munandi tyngri.

Halldór hevur júst givið úr eina myndabók um Føroyar á enskum og donskum, sum kallast á donskum "Føroyar i dag". Hetta er partur av eini røð, sum inntil nú eisini hevur umfatað Ísland og Grønland.

Hann hevur verið nógv í Føroyum í hesum sambandi. Tað var hann eisini nú um dagarnar saman við einum soni. Ein dag fara teir útferð niðan á Klakk. Tá møta teir nøkrum fólkum og koma í prát við tey, og 20 minuttir seinni sita teir heima hjá teimum og fáa kaffi. Slíkt hevði ikki hent nógvar aðrar staðni.

Halldór nevndi eisini eitt dømi um íslendskan hugburð móti føroyingum. Fyri kortum var føroyskur bilførari tikin á Suðurlandinum fyri at koyra av skjótt, og hann var í vanda fyri at bæði at missa koyrikortið og at fáa sekt. Men tá politistarnir funnu útav, at hetta vóru føroyingar, hugdu teir uttan um seg og lótu teimum koyrikortið aftur. Hetta hevði ikki hent fyri nakran annan enn føroyingar.

Halldór nevndi enn eitt dømi um, hvussu hann varð royndir av føroyingum. Um aldarskifti var hann við til at geva eina "millennium" bókarøð út um ymisk lond, har m. a. Kofi Annan, aðalskrivari í ST, stóð sum viðmælari. Teir vildu eisini gera eina serliga bók viðvíkjandi Føroyum, men her var trupulleikin tann, at Føroyar jú ikki var ein sjálvstøðug tjóð mótvegis ST. Men hetta orðnaði fyrrverandi forsetin Vigdis Finnbogadóttir við Annan!

Úrslitið gjørdist eisini ein stásilig og dýr bók um Føroyar, sum er kend av mongum. Bókin varð skjótt útseld, og tí var í umbúna at prenta eitt nýtt upplag, og tað vóru føroyingar sum bíløgdu og rindaðu fyri at fáa bøkur afturat. Men vegna ymsar óhepnar umstøður varð bókin ikki prentað, og teir sum høvdu goldið føldu seg lumpaðar.

Halldór tordi tí illa at fara til Føroyar í samband við nýggju bókina, men valdi tó at gera eina roynd.

Men greiða fekst eisini á hesum trupulleika í sambandi við teirri bókini, sum er komin nú. Her er talan um eina sera bíliga, men framvegis stásiliga bók. Soleiðis verða trupulleikar greiddir millum vinir.

Hetta merkir við øðrum orðum, at grundarlag er fyri støðugari menning av samstarvi millum londini bæði var greiða niðurstøðan hjá Halldóri Pállsyni.



*Halldór Pállson*